

*- Eg egni ein stamp soleiðis av og á, sigur Elmar Simonsen úr Hvannasundi*



*- Prísurin er góður á hummara, men tað er nakað lítið til av honum.*

fyri byrgingina um Hvannasund, og hagani er stutt á leiðirnar, har rúsurnar verða settar.

- Eg seti bara norðanfyri. Og orsøkin til tað er hin einfalda, at eingin hummari er sunnanfyri.

- Tað er meiri bleytur botnur norðanfyri, sigur Elmar.

Í loyvinum til hesa veiðuna verður sagt, at loyvt er ikki at draga oftari enn annanhvønn dag. Og vanliga plagar hann tí at draga annanhvønn dag, og onkutíð triðjahvønn dag.

Í sama loyvi hevur Elmar møguleika at seta við 250 rúsum, men hann brúkar ikki henda møguleikan fult út. Hann hevur tískil bert 230 rúsur.

## Gott, men strævið

Við jøvnum millum verða korini hjá fiskimonnum og útróðrarmonnum havd til umrøðu manna millum og aðrastaðni, har tjakast verður.

Men hvussu er hjá teimum, ið royna eftir hummara? Hvussu eru teirra kor? Tosar nakar um tey? Og er tað eitt gott lív at vera hummarafiskari?

- Ja, tað haldi eg. Tað er eitt gott lív. Men onkutíð kann tað vera eitt sindur strævið, tá man skal draga rúsurnar og um man er einsamallur umborð.

- Tað er eitt sindur strævið, tá 230 rúsir skulu takast inn, hóast eg havi spæl umborð, sigur hann.

Henda dagin vit vitjaðu skúrin hjá Elmari hevði veðrið verið sera ólagaligt dagin fyri og um náttina.

Og fyrrapartin henda dagin var heldur ikki av besta veðri, tí rættiliga tung alda var í sjónum.

- Í dag fari eg so ongan veg, tí tað var so keðiligt veður í morgun. So eg sló av beinanvegin.

- Men eg vænti at fara norður at draga í morgin, leygardagin.

## Av Hvannasundi til Italia

Eitt er at seta rúsirnar út, men eitt annað er so at draga tær umborð.

Men eitt heilt triðja er so tað arbeiðið, sum gerast skal, tá hummarin er komin innanborða. Tá skal nevniliga berast skjótt at, tí hummarin er "veðursjúkur", um ein kann siga tað so.

Tað er tí best - fyri allar partar - at tað er gott veður, tá rúsirnar verða drignar. Hummarin verður lagdur livandi í kassar umborð á bátinum, men er ikki serliga glaður fyri føroyska regnið.

- Tað er ikki gott fyri hann, um hann stendur ov leingi í kassunum í regninum.

- Hann skal jú vera livandi og frískur, frá tí at hann verður drigin her í sundinum og til hann er komin allan vegin fram til Italia, ella hvar hann nú einaferð endar.

## Góður prísur

Avgerandi fyri ein útróðrarmann og ein hummarafiskara er prísurin, ið fæst fyri veiðuna.

Her eru hummarafiskararnir í teirri hepnu støðuni, at prísurin á hummara er rímiligur - fyri ikki at siga góður.

Hummarin, ið fæst norðan fyri er nakað størri enn aðrastaðni í landinum, og tí fæst eisini meiri fyri hann frá keyparunum.

- Akkurát, hví hann er størri her, veit eg ikki. Men ein orsøk kann vera, at tað er minni fiskur at fáa.

- Tað er minni av hummara nú, enn tað hevur verið. Tað hevur verið so nógvur toskur inni á firðunum, og hann hevur etið nógv av hummaranum, sigur Elmar.

Hann vísir hetta við einum dømi: Tann eina dagin setti hann eina kalvalínu út fyri Múlan. Og í tí eina maganum fann hann ikki færri enn tríggjar hummarar.

Hvannasund er tó einki eindømi um hetta, tí hann hevur hoyrt um tað sama, bæði í Árnafirði og í Tangafirði.

- Og vit hava eisini sæð upp í seks hummarar í maganum. So tú skilir, at stovnurin av hummarum er nógv minkaður av hesum, endar Elmar samrøðuna.